gult cyan magenta svart





Hans Jørgen og Gunnleyg arbeiða bæði sum dagrøktarforeldur í Hósvík

# Dagrøktarpápi í Hósvík

*Eftir at hava verið sjómaður og radiomekanikari reiðiliga hálvan mansaldur, er fyrrverandi ísfiskaskiparin farin at passa børn*

Orð: Edvard Joensen
Myndir: Jens K. Vang

**Hósvík:** Fyrsta september byrjaði Hans Jørgen Christensen í nýggjum starvi sum dagrøktarpápi hjá Hósvíkar Kommunu. Eftir at hava verið eini 37 ár á sjónum, er tað ein rímiliga stór broyting, viðgongur hann.

Dagrøktarbørnini í Hósvík eru samlað í bygdarhúsinum fyrrapartin mikudagin. Tey eru rímiliga nógv í tali, og nakrar dagrøktarmammur eru við teimum. Og ein pápi.

Hin 55 ára gamli Hans Jørgen Christensen er júst byrjaður sum dagrøktarpápi í Hósvík, og tað er væl dámt, verður látið at. Bæði av foreldrum, og ikki minst av børnunum.

Hans Jørgen spælir við tey smáu á gólvinum. Tey hava byggiklossur og aðrar leikur. Og so mitt í øllum er ein drongur, sum vil ríða, og sjálvandi er Hans Jørgen hestur. Soleiðis. Júst sum tað gongur fyri seg heima.

Hans Jørgen Christensen er dani, sum er giftur føroyskari konu. Tey búgva í Hósvík. Hann er útbúgvin radiomekanikari og skipari. Í umleið 20 ár var hann í donsku sjóverjuni, og seinni hevur hann verið næstan líka leingi við føroyskum ísfiskatrolarum. Hann hevur verið bæði stýrimaður og skipari, greiðir hann frá.

Hans Jørgen greiðir frá, at hann hevði verið sjúkrameldaður, eina tíð, áðrenn hann gjørdist dagrøktari. Hevði verið gjøgnum eina størri skurðviðgerð. Konan, Gunnleyg, arbeiðir sum dagrøktarmamma, og tá søkt varð eftir dagrøkt herfyri, søkti hann hetta starvið og fekk tað. So nú hava tey tíggju dagrøktarbørn í húsinum, hann og Gunnleyg. Og tað sær út til at rigga væl.

Og Gunnleyg er eisini væl nøgd við skipanina. Nú er maðurin heima alla tíðina. Ikki sum tá hann var við ísfiskatrolarunum. Nei, tað er ikki tað sama.

Kristina Nybo er leiðari á kommunalu dagrøktini í Hósvík. Hon sigur, at hjá henni var eingin ivi, tá Hans Jørgen søkti starv. Hann varð settur beinanveg. Hon veit ikki um, at nakar annar maður er í slíkum starvi aðrastaðni.

Í Hósvík eru í løtuni 35 børn í aldrinum eitt til níggju ár í kommunalari dagrøkt. Men pláss er annars fyri 40 børnum, sigur Kristina Nybo.



## Barnaverndin fingið sálarfrøðing

**Barnaverndin hjá Tórshavnar Kommunu hevur fingið sálarfrøðing at taka sær av barnaverndarmálum hjá kommununi. Sálarfrøðingurin fer at arbeiða hálva tíð fyri barnaverndina og hálva tíð hjá umsitingini**

Edvard Joensen

**Tórshavn:** Tann 1. januar komandi ár tekur Sigrun Samuelsen, sálarfrøðingur við starvi sum sálarfrøðingur hjá barnaverndini og umsitingini hjá Tórshavnar Kommunu. Hon skal arbeiða hálva tíð á hvørjum staðnum.

Elin Lindenskov, formaður í sosialu nevnd Tórshavnar Býráðs, sigur, at mett varð, at tørvurin á einum sálarfrøðingi var so stórur, at rætt var at seta ein í starv.

Tað kann bæði vera tekin um, at tungu málini økjast í tali, men eisini ein ábending á, at barnaverndarnevndin er vakin og tekur arbeiðið í álvara.

Ikki so at skilja, at undanfarnar nevndir ikki hava gjørt tað, men tað tykist, sum slík mál, sum hoyra barnaverndini til, gerast alt fleiri. Ella bara sjónligari, sigur Elin Lindenskov.

Hon sigur, at tað gerst alt meira vanligt, at fólk, bæði børn og vaksin, verða meira opin, tá talan er um mál sum eitt nú insest og harðskap. Eisini stovnar og feløg eru farin at vera meira vakin og fylgja við, hvussu tað einstaka barnið hvur tað og ber seg at.

Sálarfrøðingurin, sum nú er settur í starv, fer at verða við í teimum málsviðgerðum, barnaverndin hevur, umframt eisini at gera uppsøkjandi arbeiði, har tað til einahvørja tíð tykist neyðugt.

Umframt at arbeiða beinleiðis fyri barnaverndina skal sálarfrøðingurin eisini arbeiða hálva tíð fyri fyrisitingina hjá býráðnum.

Fyrisitingin hevur eisini brúk fyri vegleiðing. Tað hevur verið so, sigur Elin Lindenskov, at býráðið hevur keypt sær hesa tænastuna frammanundan. Tað er í lagi at brúka konsulentar, men tá ein hevur egna arbeiðsmegi, sum ein kann brúka 100 prosent, verður tað uttan iva lagaligari at arbeiða.

Eisini hevur Tórshavnar Kommuna sett ein samskipara at taka sær av barna- og familjumálum. Tað er Katrin Petersen, sum fyrr hevur verið leiðari á dagstovnin-um í Hoyvík.

gult cyan magenta svart



# Tingfundur haldast í Útvarpinum

*Útvarpshøllin verður karmur, tá tingið í aðru viku kemur saman at viðgera eykajáttanaruppskot*



*Rúmliga Útvarpshøllin verður á fyrsta sinni tingsalu í komandi viku*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

John Johannessen

Løgtingsins formansskapur hevur gjørt av, at Útvarpshøllin skal virka sum tingsalur, meðan tinghúsið verður umvælt.

Fyrsti tingfundurin í Útvarpshøllini verður í aðru viku, tá tingið kemur saman at viðgera uppskot frá Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um eykajáttanarlóg fyri oktober.

**Fleiri møguleikar**

Formansskapur løgtingsins og umsitingin á Løgtingsskrivstovuni hava havt fleiri høli í kikaranum at halda løgtingsfundir í, meðan tinghúsið verður umvælt.

Millum uppskotini hava Havnar Klubbi og Hotel Hafnia verið nevnd. Men formansskapurin er komin til ta niðurstøðu, at Útvarpshøllin er best egnað.

Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður, vísir á, at útvarpshøllin er rúmlig, og tískil kann hon væl hýsa teimum 32 tinglimunum, teimum 7 landsstýrismonnunum, løgtingsskrivarunum, ríkisumboðnum og áhoyrarum.

Eisini vísir Finnbogi Ísakson á, at rúm eru uttan um Útvarpshøllina, hagar tingfólk kunnu leita sær at práta saman. Somuleiðis er Norðurlandahúsið nærhendis og Útvarpið hevur eisini høli, har møguleiki er at halda nevndarfundir.

**Umstøður at taka upp**

Ein løgtingslóg frá 1981, sum kortini enn ikki er lýst, staðfestir, at allar munnligar umrøður á tingi skulu staðfestast við banduppltøku.

Hóast lógin enn ikki er lýst, hevur løgtingið fylgt hesi lóg.

Í Útvarpshøllini ber sjálvsagt væl til at taka løgtingsfundirnar upp á band, og tað fer eisini at verða gjørt. Men løgtingsformaðurin vísir á, at fundirnir kortini ikki fara at verða sendir afturvið royndarmyndini hjá Sjónvarpinum eins og vanligt.

## Tveir nýggir býráðslimir

*Tveir býráðslimir úr Fólkaflokkinum hava boðað frá, at teir fara í farloyvi frá býráðsarbeiðnum, og nýggir limir taka teirra sæti*

Stefan í Skorini

Páll Petersen hevur boðað frá, at hann er í farloyvi frá 18. august í ár. Í býráðið fyri Páll Petersen kemur næsti maður á listanum, sum er Steen Juul Pedersen.

Eisini Jan Christiansen er í farloyvi. Hansara farloyvi byrjaði 22. august. Næsti maður á listanum er Jákup Jacobsen, og hann tekur sætið hjá Jan Christiansen í býráðnum.



Hesi bæði farloyvini vórðu fráboðað býráðnum hóskvøldið, tá býráðsfundur var. Á hesum fundi varð eisini 3. og 4. viðgerð av ársfíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu. Í sambandi yvirtøku av barnaansingarøkinum verða nakrar broytingar gjørdar.


HEIMA BIO




Fruen på Hamre

VIDEOTOP 10

VIKA 36

1 American Beauty
2 Jeanne d'Arc
3 Blue Streak
4 The Bone Collector
5 Den sjette sans
6 Den grønne mil
7 Nattens skygger
8 Three to Tango
9 House on Haunted Hill
10 Instinct

| | |
|---|---|
| Í Gundadali | tel. 31 47 70 |
| Í Kollafirði | tel. 42 10 83 |
| Í Saltangará | tel. 44 91 33 |
| Í Klaksvík | tel. 45 73 53 |
| Í Sørvági | tel. 33 20 01 |
| Í Leirvík | tel. 44 33 60 |
| Í Skálafirði | tel. 44 12 00 |

STATOIL

støðirnar kring landið

petur & petur 320870